


*Allir teir 84 føroysku luttakarnir avmyndaðir við fráferðina úr Vágum mikukvøldið*

# Føroyingar á størstu donsku byggimessuni

**300 danskir veitarar av tilfari og amboðum til byggivinnu settu í farnu viku hvørjum øðrum stevnu í Fredericia Messecenter. Millum luttakarnar var eisini eitt ferðalag við 84 føroyskum luttakarum, sum Timburhandilin hevur boðið við á messuna**

BYGGERI 2006
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Á hesi messuni bar til at síggja alt tað nýggjasta innan byggivinnuna, bæði tá talan er um tilfar og amboð.

Her vóru omanfyri 300 ymiskir veitarar av vørum og tænastum til byggivinnuna, og stórur áhugi er fyri hvørjum einasta bási.

Hetta er ein messa sum verður hildin annaðhvørt ár, og tað er ikki at taka seg aftur í at hetta er nakað sum menn – teir flestu luttakararnir á stevnuni eru nevniliga menn – síggja fram til.

Messan byrjaði týsdagin, og fyrstadagin vóru um 6000 fólk á vitjan.

Fyrireikararnir mettu, at eini 30.000 vitjandi fóru at koma inn á básarnar hesar dagarnar messan var opin.

Føroyska ferðalagið fór við leiguflogfari til Danmarkar mikukvøldið og kom aftur fríggjakvøldið.

Nakað undan messuni sendu teir á søludeildini hjá Timburhandlinum út persónligar innbjóðingar til bæði verandi – og helst eisini komandi! – viðskiftafólk hjá fyritøkuni. Og teir svaraðu allir ja uppá standandi fót.

– Hetta er veruliga ein messa, sum teir síggja fram til og gleða seg til, søgdu Niclas Juul Olsen, Jan á Argjum og Kenneth B. Olsen undan messuni.

Heimafturkomnir kunnu teir bara staðfesta at so var!

**Á næstu síðunum eru myndir og frásøgn frá messuni.**

## Góð keyp við skjótari avgreiðslu

Eitt av endamálunum hjá Timburhandlinum er at veita kundum sínum eina góða tænastu.

Ein partur av hesi tænastuni er at vísa teimum tað stóra úrvalið sum finst úti í heimi, og sum handilin sjálvur kann bjóða fram av nýggjum tilfari, amboðum og aðrari útgerð.

Við sær á messuna høvdu hesir 80 handverksmeistararnir eina rekvisitión frá Timburhandlinum, sum skuldi nýtast í samband við keyp av vørum.

Treytin fyri at kunna keypa á messuni var, at tann einstaki handverksmeistarin hevði eina slíka rekvisitión við stemplinum hjá Timburhandlinum á. Uttan eina slíka varð keypið ikki góðtikið av seljaranum.

Hinvegin so kundi Timburhandilin upplýsa handverksmeistarunum at tann vanliga leveringstíðin uppá tað, teir høvdu keypt var 2 til 3 vikur.

Og sum skilst nýttu fleiri teirra eisini høvið at keypa bæði eitt og annað á byggimessuni.



*Nýggi stjórin í Timburhandlinum, Jørmann Petersen var sjálvandi við í ferðalagnum*